## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av eystri og regn. Seinnapartin lækkar hann niður í sunnan og minni vindur. Møguliga mjørki og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum, um kvøldið upp í ein strúk av landsynningi. Ælingur og hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og sirm ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og mánadagin ælingur, men týsdagin yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 8 og 12 stig.

# Gøtumenn nýggja kiosk

**– Í gjár opnaði nýggjur handil í Norðagøtu. Ongin matvøruhandil hevur verið í Norðagøtu í fleiri ár, og er tað Hallur Poulsen, ið eigur handilin.**

HANDIL
*Ingrid Bjarnastein*

– Eg havi allar vørur, og kanska líkist tað einum matvøruhandli, men tað eitur ein kiosk, sigur Hallur Poulsen úr Gøtu, sum í gjár opnaði nýggjan handil í Norðagøtu. Handilin stendur beint við fótbóltsvøllin.

Hallur Poulsen átti áðrenn ta lítlu kioskina við grill í Norðagøtu. – Men tað vísti seg, at hon var alt ov lítil, sigur Hallur Poulsen.

– Bygningurin, ið eg havi bygt, er umleið 400 m² tilsamans. Harav er niðara hæddin umleið 240 m².

Niðara hæddin er kiosk, og ætlanin er, at grill skal eisini vera har, soleiðis at tað verður møguligt at eta inni.

Spurdur um tað loysir seg at opna kiosk í Gøtu tá Runavíkin liggur so nær við svarar Hallur:

– Um eg havi nóg góða vøru í handlinum, so burdu fólk ikki farið til Runavíkar at keypt.

Leggjast kann at enda afturat, at tað var kioskin hjá Halluri, sum í seinastu viku fór til Eiðis, og steðgaði allari ferðsluni í Eysturoyartunnlinum.



*Kanska líkist tað einum matvøruhandli, men tað eitur ein kiosk, sigur Hallur Poulsen úr Gøtu*



*Handilin hjá Halli stendur beint við fótbóltsvøllin*


- Bókhald
- Ársroknskap
- Fíggjarætlan
- Grannskoðan
- Fíggjarráðgeving

**Tosið við okkum!**

Føroyabók
Skrásett Grannskoðaravirki

Vágstún 2 · Postsmoga 144 · 700 Klaksvík
Tel 455522 · Far 217505 · Fax 457705


## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 3 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | 14 |
| Halifax | 19 |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | – |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 17 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 14 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 21 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 17 |
| Madrid | 22 |
| Róm | 23 |
| Malorca | – |
| Athen | 27 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 17 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 20 |
| New York | 26 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 6 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 978 hPa. á 52N-30V fer spakuliga í landnyrðing og dýpist nógv.




Eitt djúpt lágtrýst, undir 960 hPa. vestan fyri Írland fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum í dag.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/10 kl. 06[00]– 04/10 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 9,7°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,6 mm – mált frá 03/10 kl. 06[00]– 04/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 14,6 mm




* Dustsúgvarar
* Mikroovnar
* Kaffimaskinur

...og mangt annað

Elkeyp
... so einfalt

VikuBlaðið 321 000



**Diesel bilar til sølu**

| | |
|---|---|
| BMW 525 TDS, | árg. 94 |
| BMW 525 TDS, | árg. 98 |
| MERCEDES E300TD, | árg. 97 |
| VW GOLF TDi, | árg. 97 |
| VW GOLF SDi, | árg. 96 |
| NISSAN PATROL, | árg. 89 |

Sp/f AUTOIMPORT
217778 - 218778


## VESTFALLSKYRRINDI

29. sept.: Mánin longst frá jørðini
2. okt.: Fullmáni
10. okt.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. okt | 09.13 | 21.33 | 08.13 | 20.33 | 08.28 | 20.48 | 11.13 | 23.33 | — | 12.13 | 07.28 | 19.48 | 06.28 | 18.48 | 09.28 | 21.48 | 10.28 | 22.48 | 08.58 | 21.18 | 10.13 | 22.33 |
| 6. okt | 09.53 | 22.15 | 08.53 | 21.15 | 09.08 | 21.30 | 11.53 | — | 00.33 | 12.53 | 08.08 | 20.30 | 07.08 | 19.30 | 10.08 | 22.30 | 11.08 | 23.30 | 09.38 | 22.00 | 10.53 | 23.15 |
| 7. okt | 10.38 | 23.01 | 09.38 | 22.01 | 09.53 | 22.16 | 00.15 | 12.38 | 01.15 | 13.38 | 08.53 | 21.16 | 07.53 | 20.16 | 10.53 | 23.16 | 11.53 | — | 10.23 | 22.46 | 11.38 | — |
| 8. okt | 11.25 | 23.50 | 10.25 | 22.50 | 10.40 | 23.05 | 01.01 | 13.25 | 02.01 | 14.25 | 09.40 | 22.05 | 08.40 | 21.05 | 11.40 | — | 00.16 | 12.40 | 11.10 | 23.35 | 00.01 | 12.25 |